Viðmerking:

# Landsverksfrøðingsstovnurin skal burtur

*- nógv er, sum bendir á, at Finnbogi Arge hevur vunnið týdningarmiklan sigur í strembanini eftir at niðurleggja landsverkfrøðingsstovnin, sigur Finnur Helmsdal, løgtingsmaður Tjóðveldisfloksins í bersøgnari viðmerking*

**Privatiserið landsverkfrøðingin!**

**Hví ikki lata privatu vinnuna kappast um umvæling og nýgerð av vegum, og hví ikki bjóða asfaltverk, grótbrot, projektering o. a. virksemi út til tann privata marknaðin.**

*Brot úr Dimmalætting 19. mars 1992, tá Finnbogi Arge, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin legði fram uppskot fram á ting um at privatisera Landsverkførðingin*

Síðan verandi samgonga varð stovnað mai 1998, hava vit fingið nógv, meira og minni ítøkilig, dømi um, at landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Finnbogi Arge, hevur rættiliga stóran áhuga í at niðurleggja landsverksfrøðingsstovnin. Vit kunnu hvør í sínum lagi gita um hví, men høvuðsorsøkin er uttan iva, at uppgávurnar skulu lutast út til privatar at fremja í verki. Allar aðrar intentiónir kunnu vit sum sagt bert hugsa okkum til.

Skal ikki tríva í aftur skammiligu gerðina at siga landsverksfrøðinginum upp, tí ta søguna kenna øll. Skal heldur ikki viðgera søguna um fasta sambandið. Men aftaná at hava sæð viðgerðina av undirsjóvarstunnilsmálinum í SvF mikukvøldið, kann eg ikki annað enn enn eina ferð traðka alment fram og siga hugsan mína um viðurskiftini millum Finnboga Arge og landsverksfrøðingsstovnin. Eg gjørdi tað í august 1999, tá eg spurdi løgmann, um hann ikki helt tað vera bæði rætt og neyðugt við óvildugari kanning av leiklutinum hjá landsstýrismanninum í samband við uppsøgnina av Henningi Jacobsen. Men fyrst løgmaður og síðan landsstýrismálanevndin tóktust samd um at reinska landsstýrismannin.

Tað er helst ov seint at gera óbótagerðirnar góðar aftur, men vit eiga at leggja doyðin á at forða fyri, at fleiri slíkar verða gjørdar. Vit eiga at seta føtur í spenni móti ætlanunum, hjá Finnboga Arge og Fólkaflokkinum, um at niðurleggja LV-stovnin. Endamálið við hesum ætlanunum er fyrst og fremst at fita ávísar privatpersónar og feløg, sum so aftur fyri kunnu útvega flokkinum atkvøður gjøgnum virksemi sítt.

**Krosskast ein farsa**

Nevnda krosskastsending var í mínum eygum ein fløkjaslig farsa, har Finnbogi Arge, Klæmint Weihe, Jógvan á Lakjuni og Tróndur Djurhuus slógu ring um Heina O. Heinesen. Ja, tað var sum hoyrdi eg teir kvøða Jákup á Møn. Tá vit ikki sóu hesar myndirnar, slapp annað sjóvarpsfólk Henrikki Old úr Javnaðarflokkinum (mest álíkur siðiligasta smádronginum, sum valla hugdi upp) og Alfredi Olsen (við himmalvendum eygum) úr sambandsflokkinum upp í dansin. Sum beinleiðis snultarar, ið brádliga stóðu og tóku sær æruna av at vilja bæði eitt og annað Føroya fólki og landsverksfrøðingsstovninum at frama. Stórsligin sjónleikur og einki annað. Kanska skilur ein, at SvF datt í grøvina, og valdi at gera gjøldur burturúr og lýsa Tjóðveldisflokkin sum stóra taparan. Tað var so lætt at gera tað. Tað var kanska torførari at fara í holtur við hinar. At lýsa leiklutin hjá Finnboga Arge, at lýsa virksemið hjá SEV stjóranum í mun til útlendskar fyritøkur, at lýsa hugburðin hjá Jógvani á Lakjuni í mun til tunnilsmálið. At lýsa veruliga hugburðin hjá Javnaðar- og Sambandsflokkinum í sama máli. Kanska var tað heldur ikki endamálið við sendingini. Meiri manssømiligt hevði tað tó verið, um journalistarnir eisini settur landsstýrismanninum við fjákuta smílinum viðkomandi spurningar.

Innan tinggátt hava tað bert verið Finnbogi Arge, Heini O. Heinesen (vegna Tjóðveldisflokkin) of vágatingmennirnir, sum hava víst undirsjóvartunnlinum politiskan ans. Finnbogi hevur ynskt alla verkætlanina á privatar og bert privatar hendur, Heini hevur roynt at mótvirka hesum soleiðis, at landsverksfrøðingsstovnurin kom inn aftur á vøllin, og vágatingmenn hava sagt: Eitt hol er eitt hol, og so er líka mikið hvør borar, fíggjar og bestemmar (samstundis tykjast teir ikki at vera so ideologiskt ósamdir við Finnboga Arge). Javnaðarmenn og sambandsmenn hava valla givið málinum ans fyrr enn nú, álitið verður skrivað.

Úrslitið av øllum er tað syndarliga, at Finnbogi Arge og Klæmint Weihe fingu buktina um báðar endar. Teir hava alla ábyrgd, allan avgerðarrætt. Hetta tá tað snýr seg um at leggja tilrættis, gera arbeiðið og fyriskipa fígging. Landsverkfrøðingsstovnurin fær eitt heiti av periferiskum leikluti, ið ikki eingang kann metast á hædd við suflørin.

Tað mundi kennast á flest øllum hjartastreingjum, tá Klæmint Weihe við táravættum eygnakrókum takkaði skaparanum fyri, at hann loksins var sloppin at samstarva við LV, og hann lovaði at útnyta henda møguleika til fulnar. Ja, knappaborð mítt kámast, bert eg hugsi um hesa søguligu løtu.

Vóni, at arbeiðið við undirsjóvartunnlinum fer at gangast væl, og at verkætlanin ikki verður ov dýr. Men gongur alt ikki eftir vild, tá vita vit hvør má taka yvir bæði ábyrgd og skuld.

**LV privatiserast**

Tað er altíð torført at fremja broytingar. Eg rokni tí heldur ikki við, at stórur møguleiki er fyri at fremja broytingar verkætlanini viðvíkjandi. Rokni heldur ikki við, at Heini nakran tíð verður vælorðaður sjónleikari. At fremja broytingar í politiska spælinum, havi eg heldur ongar vónir um. Pressan heldur fram, sum hon er von o.s.fr.

Spurningurin er so, um tað yvirhøvur loysir seg at siga, skriva ella gera nakað meira í hesum máli. Kanska ger tað ikki tað. Tó fari eg við sjónleikinum í Krosskasti í huga at vísa á tað, ið er skrivað omanfyri, og annars minna fólk á, hvat Finnbogi Arge og Sambandsflokkurin gjørdu í mars 1992.



*– Hvønn arbeiðir Finnbogi Arge í veruleikanum fyri, spyr Finnur Helmsdal*

Tá legði táverandi løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin, Finnbogi Arge, uppskot fyri tingið um at privatisera landsverksfrøðingsstovnin. Hetta gjørdi hann vegna Sambandsflokkin.

Krubban var um at verða tømd mars 1992, og bæði Finnbogi og táverandi flokkur hansra lupu á leistum fyri teimum, sum hava fremst í huganum at skora lætt- og skjóttvunnan profitt. At grundarlagið undir profittinum fult og heilt byggir á almenna skattakrónur rørir teir ikki. At royndir og vitan frá fimti ára dygdararbeiði fer í allar ættir og fyri skeyti, nervar teir heldur ikki. Tað ræður at skora profittin, so kann alt annað vera líkamikið. Tað nervar ikki teir, um Føroyar gerast ein byggitekniskt oyðimørk.

Nú er Finnbogi ikki í Sambandsflokkinum longur. Men har hann er komin, hevur hann enn rúmari ræsur at slóða fyri og stuðla privatkapitalismuni. Situr hann nóg leingi í sessinum, so fer tað at eydnast Finnboga Arge at niðurleggja landsverksfrøðingsstovnin. Hesum og øðrum líknandi ideologiskum sveinastykkjum skulu og migu vit forða honum í. Vit eiga at virka sambært tørvinum hjá landi og fólki og ikki hjá markleysu og harðrendu girndini.

**Finnur Helmsdal,**
**tjóðveldismaður**

## Steingja Marknagilsvegin - bussleiðin umløgd

Tórshavnar Býráð hevur á fundi tann 27.01.2000 samtykt at fara undir arbeiðið at breiðka Marknagilsvegin frá arbeiðstøkumarkinum við Kongsgil og út til økið við P/F Mark (við Rættará).

Farið verður undir arbeiðið so skjótt sum sáttmáli er undirskrivaður við P/F Guttesen & Staksberg. Í hesum sambandi verður bussleiðin umløgd soleiðis, at ikki verður koyrandi á Marknagilsvegnum frá íbindingini við Svalbardsvegin til Dánjalstrøð (við Skúlaheimið).

Henda broyting merkir, at leið 1 frá Farstøðini koyrir um Steinatún og niðan eftir Dalavegnum, fer vestur eftir Marknagilsvegnum og dreygar síðan oman eftir Svalbardsvegnum og Grønlandsvegnum. Leið 1 koyrir víðari út eftir J. Patturssonargøtu og Landavegnum og fer síðan út móti Handilsskúlanum, har vent verður. Leiðin fer síðan eftir Marknagilsvegnum, fram við íbindingini við Landavegin og oman móti Velbastaðvegnum, oman móti Landssjúkrahúsinum fram við J. C. Svabosgøtu og oman aftur á Steinatún.

Leið 1 frá undir Brúnni, um Berjabrekku og Sundsvegin oman eftir Varðagøtu og Tróndargøtu. Síðan út móti Landssjúkrahúsinum og út eftir Velbastaðvegnum til Handilsskúlan, har vent verður. Frá Handilsskúlanum verður koyrt heim eftir Landavegnum og oman eftir J. Paturssonargøtu og Tórsgøtu til Farstøðina.

Viðmerkjast skal, at leiðin út á Norðasta Horn verður eisini umløgd, soleiðis at koyrt verður ikki eftir Velbastaðvegnum, ið er landsvegur, men gamla Velbastaðvegnum, ið er kommunalur vegur, sigur Boði Haraldson, býarverkfrøðingur í Havn í tíðindaskrivi.



**Ítróttur**

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið um flogbóltin um vikuskiftið í blaðnum í morgin

# Alt er framvegis púrasta opið

*Við einum uppibornum sigri í Vestmanna gjørdu strandingar sítt til, at kappingin í fyrstu deild framvegis er fullkomuliga opin. Stóri leikarin í dystinum varð John Petersen, sum einsamallur gjørdi heili 15 mál*



*Á myndini fær Sveinbjørn ein ordiligan sendara, men tá tað kom til stykkis vórðu hann, Jónleif og hinir liðfelagarnir omaná móti vestmenningum*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

VÍF-StÍF 25-28 (11-12)

Alt kappingarárið á tamb, hava strandingar verið við til at mynda toppin á stigatalvuni, síðani teir seinasta dystinum í grundspælinum taptu móti vestmenningum, hevur úrtøkan ikki verið hin besta.

Í landskappingini taptu teir fyri Kyndli, og steypakappingini syrgdi Neistin fyri, at strandingar ikki skuldu í finaluna annað árið á rað. Har afturat høvdu teir stórar trupulleikar at basa hoyvíkingum, tá hesir vóru á Skála og vitjaðu.

Nú gekk leiðin so til Vestmanna, har vestmenningar við einum sigri, kundu taka eitt risafet frá strandingum í oddinum, men hinvegin kundi StÍF eisini nærkast VÍF, um stigini fóru inn á Skálafjørðin, og tað var júst hetta, ið hendi.

**Lítil munur**

Í fyrra hálvleiki vóru annars ongar greiðar ábendingar um, hvørt av liðunum skuldi standa seg betri.

Sera lítil munur var á liðunum báðum, og har umframt gjørdu máleverjarnir báðir sítt til, at máltalið varð rættuliga lágt.

Eina løtu høvdu VÍF leikararnir hug at skræða seg leysar, men eftir at strandingar nýttu eitt time-out, funnu teir rætta lagið aftur, og tá dysturin var hálvrunnin, høvdu teir aftur tikið seg fram um VÍF.

Hálvleikurin varð annars merktur av, at liðini bæði royndu at byrgja upp fyri hvørjum øðrum. StÍF byrjaði beinan vegin at mansverja Inga, sum ongantíð kom rættuliga fyri seg í dystinum.

Hinvegin gjørdu vestmenningar eisini sítt fyri at oyðileggja spælið hjá strandingum, við tað at Johnny leikti sum sera offensivur eittari í 5-1 verjuni, soleiðis at hetta mest av øllum minti um eina mansverjing av Jónleif.

Hetta viðførdi eisini, at broddurin varð tikin av ferðmikla spælinum, sum vit ofta hava sæð liðini bæði borðreitt við, men á ongan hátt gekk hetta út yvir spenningin í dystinum.

**Sámal mansvardur**

Í seinna hálvleiki var alla tíðina sera lítil munur á liðunum báðum. Liðini bæði skiftust um at skora, og serliga fyrstu 10 minuttirnar av hálvleikinum, komu nógv mál á talvuna.

Brádliga fóru málverjarnir báðir tó at standa seg betur, og hetta tarnaði málskjótingini rættuliga nógv. Liðini bæði fylgdust tó framhaldandi heilt væl, men alla tíðina var tað StÍF, sum hevði munin.

Móti endanum av dystinum fóru strandingar eisini undir at mansverja Sámal Joensen, men hetta viðførdi samstundis, at sera opið varð í verjuni, og dugdi serliga Agnar at nýta høvi til at bróta ígjøgnum.

Strandingarnir fingu tó spakuliga yvirtakið, og seinastu 10 minuttirnar skoraðu teir fimm ferðir, meðan vestmenningar bert fingu bóltin í netið tvær reisur hesa løtuna.

Strandingar kundu tískil fegnast um ein sera kærkomnan sigur, tá seinasta bríkslið ljóðaði.

**John og Johan**

Serliga vóru tvær orsøkir til, at StÍF kundi fara heim aftur við báðum stigunum sunnudagin.

Fyrst og fremst hevði John Petersen ein sera góðan dag, har so at siga alt, sum hann royndi riggaði. Ikki tóktist at bila, um lopið varð inn frá bakkinum ella veinginum, bólturin fór so at siga hvørja ferð í netið. Heldur ikki sveik hann álitið, tá skjótast skuldi frá sjey metra fjarstøðu, og øll seks brotskøstini, sum hann tók sær av, endaðu í netmeskunum.

Hin orsøkin var at finna í strandamálinum, har Johan Danielsen fleiri ferðir sýndi, hví hann av mongum verður mettur at vera Føroya besti málverji. Hjá áskoðarunum var í hvussu so er eingin ivi, tá glaðu eysturoyingarnir sungu »vit eiga Føroya besta málmann«.

Ikki tí, Bárður í VÍF málinum hevði eisini fleiri góðar bjargingar, men hann og vestmenningarnir gjørdist ov stuttir hesu ferð, so hansara avrik var so at siga til fánýtis.

**Einki avgjørt**

Sum nevnt omanfyri, so hevði hesin dysturin alstóran týdning fyri strandingar.

Við sigrinum eru teir nú bert tvey stig aftan fyri vestmenningar, sum eisini hava leikt ein dyst meira. Hesi bæði stigini hava strandingar møguleika at fáa longu mikudagin, tá tjaldursmenninir skulu vestur um fjørðin at royna seg.

Har afturat er Neistin eisini í hølunum á teimum báðum oddaliðunum, tí hóast havnarmenninir eru fýra stig aftan fyri vestmenningar, so eiga teir tveir dystir til góðar.

Munurin millum liðini er tískil lítil og eingin, og tískil erü útlitini fyri einum spennandi endaspurti sera góð.

**Dysturin í tølum**

**Málskjúttar:**
VÍF: Sámal Joensen 6 (2), Martin Hummeland 6, Johnny Joensen 4, Agnar Joensen 3, Ingi Olsen 2 (1), Ragnar Zachariasen 1, Petur Fr. Joensen 1
StÍF: John Petersen 15 (6), Artur Johansen 4, Sveinbjørn Poulsen 3, Jónleif Sólsker 2, Alexandur Johansen 1, Kartin Danielsen 1
**Brotskøst:**
VÍF 4, StÍF 6
**Útvísingar:**
VÍF 3, StÍF 2
**Dómarar úr Stjørnuni:**
Geir Wardum og Karsten Andersen



*John Petersen hevði ein fram úr góðan dyst sunnudagin, og lítið er at ivast í, at hann taldist millum menninar á landsliðnum, um hann hevði tikið hondbóltin fram um fótbóltin, har hann sum kunnugt eisini er á landsliðnum*

***Mynd: Álvur Haraldsen***